# Gongubrúgv um Streymin

Í næstum fer Landsverk undir at seta eina gongubrúgv uttan á Brúnna um Streymin. Hetta verður gjørt í samband við brúgvaumvælingina, sum í løtuni verður gjørd á brúnna. Tann smæla gongubreytin, sum var á sjálvari brúnni, er tikin burtur, og tí ber til at breiðka vegin um brúnna við einum metri í hvørjum borði. - Ferðslutrygdin á brúnni um Streymin verður munandi bøtt, tá umvælingin av brúnni er endaliga liðug móti sumri. Ein gongubrúgv upp á hálvan annan metur verður sett upp uttan á verandi brúgv á norðursíðuni. Umframt at tryggja tey ferðandi til gongu, hevur hendan ferðsluábótin tann fyrimunin, at samlaða vegbreiddin á brúnni fer úr tilsamans seks metrum upp í átta metrar. Tað merkir, at ein vegøksl upp á ein metur kemur afturat hvørji koyribreyt, sigur Heini Eysturoy, leiðari á vegadeildini á Landsverki. Stoypiarbeiðið á brúnni er um at vera liðugt, men betongið skal hava tíð til at styrkna í einar 20 dagar, áðrenn koyrast má eftir tí. Um hálvan februar verður aftur opið í báðum síðum á brúnni, og tá verða ferðsluljósini tikin niður. Tó verður ferðslan til tíðir nakað tarnað í sambandi við liðugtgerð av brúnni. Millum annað skal brúgvin fuktbjálvast, asfalterast og síðani merkjast upp. Alt arbeiðið á Brúnni um Streymin verður liðugt í seinasta lagi 1. juni.











# Tað ger stóran mun

**Eg kundi hugsað mær at komið her tvær ferðir um vikuna, sigur Jensa Heinesen**

**ELDRARØKT**
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Sum ein annar royndur fimleikari rennur Jensa Heinesen skjótt yvir um gólvið, vendir og so aftur. Tað kundi sæð út sum, at hon alt sítt lív hevur verið ítróttarfólk.

Nei, eg var 65 ár, tá ið eg byrjaði, sigur hon.

Jensa Heinsen var 65 ára gomul, tá ið hon fekk hjartatrupulleikar og noyddist at gevast við at arbeiða.

Hon fór at ganga til fimleik hjá Hjartafelagnum, har hon nú er forkvinna, og hon fíor at ganga til fimleik í Tilhaldinum í Havn. Jensa Heinesen fekk eisini tilboð um at koma til venjingar á Tjarnargarði, og hon heldur, at tað var orsøkin til, at henni var bjóðað at koma við til venjingarnar í Badmintonhøllini.

Ja, tað ger stóran mun. Eg kenni meg betur og orki alt nógv betur. Haraftrat hava vit tað so hugnaligt saman, sigur Jensa Heinesen.

Hon er kvik til beins, men tað er eingin treyt fyri at luttaka. Tey, sum ikki orka at renna, tey ganga, og eingin sigur, hvussu skjótt tey skulu flyta seg eftir gólvinum.

Her er eingin kapping.

- Mær dámar eisini væl, at Badmintonhøllin verður brúkt teir tímarnar, tá ið einki annað er her. Tey í Frítíðarskúlanum eru blíð og bjóða okkum kaffi, tá i vit koma og aftur, áðrenn vit fara. Eg vil mæla øllum pensionistum til at koma til hetta góða tiltakið hjá kommununi, sigur Jensa Heinesen.



*Jensa Heinesen kundi hugsað sær, at venjingarnar í Badmindtonhøllini vóru tvær ferðir um vikuna*

*Myndir: Álvur Haraldsen*